# Rús- og roykfrítt tilboð til ung

UNGDÓMSDANSUR
*Tíðindaskriv*

Dansimøguleikarnir hjá teimum ungu í Havnini hava ofta verið vánaligir. Fyri at bøta um hetta tóku tær báðar, Lise Larsen og Tone Kjeld, saman við øðrum sjálvbodnum eldsálum, fyri tveimum árum síðani stig til at stovna foreldrabólkin »Kom og dansa fyri ung«

Foreldrabólkurin aftan fyri »Kom og dansa fyri ung« leggur stóran dent á, at dansurin fer fram í rús- og roykfríum umhvørvi. Endamálið er ikki at savna so nógv ung hvørja ferð, skipað verður fyri dansiskeiðunum, men at skapa áhuga hjá so nógvum ungum sum gjørligt fyri at læra at dansa og fáa eina góða dansimentan og seta dygdina fremst. Dentur verður eisini lagdur á at hava ein lágan kostnað til dansikvøldini. Kostnaðurin er 40 kr., men hava tey ungu +konto er kostnaðurin bert 25 kr.

Byrjað varð at dansa í Platform eitt mánakvøld um mánaðin.

Nú skipar foreldrabólkurin meira fyri almennum dansi fyri ung og dansiskeiðum.

Tilboðið er til teirra, sum eru millum 13 og 18 ár, t.v.s. tey, sum ganga í 7. - 10. flokki og 1. ári á miðnámsskúla.

Dansað verður í tveir tímar. Dansilærarar, bæði útlendskir og føroyskir, eru við hvørja ferð fyri at leggja teimum ungu lag á fleiri ymiskar dansihættir.

Undirvíst verður í rock'n roll, linjudansi, breakdansi við kapping, Hip Hop, afrikanskum step, dansiframførslum, so sum serium o.ø.

Tónleikurin er sera fjølbroyttur. Alt frá diskotekstónleiki til rock'n roll verður spælt. Eisini hava gestasangarar verið bodnir við, sum t. d. Brandur Enni og James Olsen.

Tá ið skipað verður fyri dansiskeiðunum, verða hesi lýst í fjølmiðlunum, umframt at bæði brøv og teldupostur verður sendur skúlunum í Tórshavnar Kommunu. Hóast hetta eru bert fáir skúlar, ið lata við seg koma, og hetta harmast tey um í foreldrabólkinum.

»Kom og dansa fyri ung« hevur tikið upp samstarv við onnur Norðurlond, so at tey ungu í hesum londum kunnu læra teir somu dansihættirnar. Foreldrabólkurin sendi t. d. trý ung fólk til Íslands í oktober 2003 at læra seg til ungdómsdansiinstruktørar.

Í summar verður skipað fyri dansifestivali í Noregi, har ung fólk úr Íslandi og Danmark eisini luttaka, og í hesum sambandi fáa hesi trý eisini høvi at vera við. Arbeitt verður í løtuni við at fáa ung í Grønlandi við í hetta tiltak.

Í farnu viku hevði foreldrabólkurin fingið dansilærarar frá Aberdeen henda vegin, og tá varð skipað fyri dansiskeiðum úti á fleiri skúlum, á stovnum og fyritøkum í Tórshavnar Kommunu. Ætlanin hjá foreldrabólkinum er í næstum at kunna senda føroysk ung fólk til Aberdeen at læra til ungdómsdansiinstruktørar.

Søkt verður um fíggjarligan stuðul til dansitiltøk, dansiskeið, leigan av hølum, lýsingar v. m. og ferðastuðul til instruktørar ymsastaðni frá, t.d. Tórshavnar Kommunu, Jólamerkjagrunninum og grunnum úr londunum, samstarvað verður við.

Lýst verður í bløðunum, nær dansur verður, og uppsløg verða hongd upp í skúlunum og ymsastaðni í Havnini.

## VIÐMERKINGAR

# Alivinnan á einum vegamóti

**Niklái Petersen**



Neyðugt er við sjálvrannsakan innan alivinnuna, so at tað bæði lívfrøðiliga og vistfrøðiliga gongur hond í hond.

Undir øllum valstríðnum og nú hoyrist javnan, at um alivinnan fær meira útlendskan kapital, og man fær koppsett ímóti ILA, so loysir man teir stóru trupuleikarnar í alivinnuni. Gamaní hjálpir tað tann rætta vegin, men tað loysir ikki allar trupuleikar, og so langt frá tí.

Alneyðugt er við sjálvrannsakan og einari eftirmeting av allari alivinnuni, soleiðis at vit framyvir ikki gera teir somu feilir, ið vit hava gjørt. Sjálvsagt hevur ein trilvan verið í hesi vinnu, sum í øllum øðrum nýggjum vinnum.

Sjúkurnar, ið hava verið í alivinnuni, kundu uttan iva verið nógv meira avmarkaðar, um man tók størri fyrilit fyri, hvat ið náttúran klárar at sodna. Eg hugsi, at mangur alari má ásanna, at neyðtøka av náttúruni gevur afturljóð so tað battar.

Spurningar, ið eiga at setast, eru fyrst og fremst hvat lívfrøðiliga og vistfrøðiliga er ráðiligt í teimum ymisku økjunum, hvussu er reinførið á botni undir alibrúkunum, hvussu tíðum skal reinsast og takast upp undan alibrúkunum, hvussu nógv skal vera í hvørjum ringi o.s.fr., snøkt sagt eina nógv betri røkt á alibrúkunum.

Tað kemur rímiliga nógv skarn undan fleiri túsund tonsum av fiski, og verður eitt økið ikki røkt nóg væl, so er smittuvandin nógvar ferðir størri, enn um røktin av økinum er fyrsta floks.

Vit eiga at seta okkum sjálvum nógv strangari krøv, hvat tí viðvíkur og fylgja teimum upp. T.d. kundi best røkta alibrúk í Føroyum fingið eitt herðaklapp og/ella eina viðurkenning, nøkurlunda á sama hátt sum best røkta bygd í Føroyum fær. Vit mugu og skulu nýta vanligt vit og skil, um vit skullu dríva eina alivinnu á skilagóðan hátt í framtíðini.

Ivist onga løtu í, at um vit fylgja slíkum krøvum - og tað verður neyðugt framyvir, so verður alivinnuni lív laga.

**Smoltstøðirnar**

Nú væl minni av laksasmolti verður útsett komandi árini, og fleiri smoltstøðir leggja stilt, er av stórum týdningi, at menn fara at fáast við aðra aling, so at smoltstøðirnar kunnu haldast ígongd.

Tað skuldi borið væl til at alt krækling, jákupskjel, steinbýt, kalva o.a., eitt samstarv millum allar góðar kreftir í Føroyum eigur at bera ávøkst.

Fiskaaling við Áir, Fiskivinnuskúlin í Vestmanna, fóðurframleiðarar, alarar, peningastovnar o.a. eiga at stinga høvdini saman og fáa eitt skilagott úrslit burturúr, allari alivinnuni at gagni.

# Stór KT-stevna í apríl

**Í døgunum 22. og 23. apríl verður stór KT-stevna í Norðurlandahúsinum. Góðir 20 framsýnarar fara at vísa tað nýggjasta, sum føroysk kunningartøkni hevur at bjóða. Enn eru nøkur pláss eftir til framsýnarar**

TÍÐINDASKRIV

Á KT-stevnuni 2004 eru virki, feløg og stovnar í Føroyum, ið bjóða seg fram sum veitarar av vørum, tænastum og skipanum við kunningartøkni.

KT-stevnan er hildin einaferð áður í 2002. Ta ferðina var talan um eina almenna stevnu, men hesaferð er hon skipað nakað øðrvísi. Málbólkurin er fyrst og fremst vinnan og almennir stovnar. KT-stevnan er sostatt ein stevna, har virki venda sær til virki og stovnar. Harumframt vendir stevnan sær eisini til næmingar á miðnámsskúlunum og hægri útbúgvingarstovnum. Annars eru karmarnir á leið teir somu.

KT-stevnan verður skipað við áhugaverdari framsýning í Norðurlandahúsinum og ráðstevnu. Endamálið er at sýna fram og kunna um førleikar hjá føroysku kt-vinnuni í dag. Samstundis verða fleiri áhugaverdir fyrilestrar hildnir í Útvarpshøllini hesar dagarnar.

KT-skeptikarin og filosoffurin Carsten Graff heldur fyrilestur um telduna sum tøkniliga tátu. Í hinum borðinum røður eldhugaði menningarstjórin hjá donsku fyritøkuni TDC, Preben Mejer, um framtíðar kunningartøkni, nevnd Pervasive Computing. Eitt evni verður eisini kt-trygd, har danski kt-trygdarbólkurin greiðir frá royndum í gerandisdegnum.

Ætlanin er eisini at skipa fyri einum kjakpalli, har umboð fyri føroysku vinnuna, stovnar og politisku skipanina luttaka. Fokus verður sett á útlitini hjá føroysku kt-vinnuni, og spurt verður eitt nú, um kunningartøkni veruliga kann gerast ein munagóð útflutningsvinna.

Higartil hava 16 framsýnarar boðað frá luttøku til ársins KT-stevnu, sum verður í Norðurlandahúsinum 22. og 23. apríl. Væntandi verða millum 20 og 25 framsýnarar. Bert 20 prosent av gólvplássi eru eftir, og tí skulu áhugað skunda sær at boða frá luttøku. Framsýnarar kunnu melda til við at venda sær til Virkisráðgeving ella heinta tilmeldingarblað á heimasíðuni www.kt.fo.

Roknað verður við 350 vitjandi hvønn dagin.

# Ritgerðarkapping á Fróðskaparsetrinum 2003-04

TÍÐINDASKRIV

Í mars mánað 2003 lýsti Fróðskaparsetrið við ritgerðarkapping. Freistin at lata inn tilfar var 15. mars 2004. Fróðskaparsetrið hevur skipað fyri slíkum ritgerðarkappingum regluliga seinastu 30 árini. Seinasta kappingin var um gamlar bøkur, og hana vann Elin Mortensen úr Havn.

Evnið í ritgerðarkappingini hesaferð er:

**Tá ið gentur og dreingir gerast vaksin**

Sóknast verður eftir lýsingum av skiftissiðum fyrr og nú í sambandi við, at gentur og dreingir verða vaksin. Hvørjar vóru og eru tær týdningarmiklu hendingarnar og broytingarnar, sum vekja ans og viður--kenning? Vit vita, hvussu rørd foreldur vóru fyrr, tá ið dreingirnir veiddu vaðanskalvan. Og hvussu errin tey eru nú t.d., tá ið sonurin skjýtur fyrsta málið. Nær eru foreldur rørd og errin av døtrunum?

Hvørjar hendingar vaktu og vekja ans í uppvøkstrinum hjá gentum og dreingjum? Hvat varð og verður gjørt burtur úr, tá ið gentur og dreingir fara um avgerandi mørk í uppvøkstrinum?

Talan kann vera um siðir í sambandi við skyldur, heimildir, ábyrgd, virðing, sum fylgja við, tá ið børn fara um markið, ið ger tey til vaksin fólk. Skiftið sæst ofta aftur í klædnabúna og øðrum viðvíkjandi útsjónd, hárgreiðslu og atburði yvirhøvur. Eru onnur eyðkenni?

Tey sum lata kappingini tilfar gera sjálvi av hvørjum tíðarskeiði tey arbeiða við. Tað kunnu vera egnar royndir ella ymiskt, sum tey hava hoyrt frá eldri fólkum.

Freistin at lata inn tilfar til kappingina er 15. mars 2004. Fólk eru vælkomin at seta seg í samband við Fróðskaparsetrið um okkurt er at spyrja um, annaðhvørt skrivliga ella við at ringja. Bústaðurin er: Setursskrivstovan, J. C. Svabos gøta 14, tlf. 35 25 00. Eisini ber til at senda teldubræv á setur@setur.fo

Ein dómsnevnd verður sett at meta um innkomna tilfarið og virðislønir verða latnar fyri bestu úrslitini.




*Leikhúsið Gríma*

framførir

***Føroyingasøgu***

***Leikur fyri øll***

Leikstjórn Ria Tórgarð

á Meiarínum

| | |
|---|---|
| **hósdagin** | **5. februar kl. 20.00** |
| **fríggjadagin** | **6. februar kl. 20.00** |
| **leygardagin** | **7. februar kl. 16.00** |
| **sunnudagin** | **8. februar kl. 16.00** |

Atgongumerki: á kr. 80,-

fáast á Kunningarstovuni ella við dyrnar 1 tíma undan sýning.


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3689, P/F Fastognarfelagið Føroyar, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 14.01.2004.
**Strikan av hjánavni:** P/F Fastogn
**Nýtt navn:** P/F Fastogn
**Nýtt hjánavn:** P/F Fastognarfelagið Føroyar (P/F Fastogn)
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið av stjóranum saman við einum valdum nevndarlimi ella av tveimum valdum nevndarlimum.

*Skráseting Føroya tann 3. februar 2004*
*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3315, Sp/f Wenzel Bilaleiga, 100 Tórshavn.

**Stjórn:**
Innkomin sum stjóri: Peter Smith Petersen, Mikkatrøð, 350 Vestmanna.
**Grannskoðari:**
Farin frá sum grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 3. februar 2004*
*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2065, P/F Wenzel, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 18.12.2003
**Kapitalur:** Hækking við kr. 2.850.000,00 til kr. 3.401.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 2.850.000,00 við skuldarumskifti til kurs 100.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Peter Smith Petersen, Mikkatrøð, 350 Vestmanna.
**Innkomin í nevndina:** Asbjørn Tobias Smith Petersen, Bistrup Park 79, DK-3460 Birkerød.
Stjórn:
**Innkomin sum stjóri:** Peter Smith Petersen, Mikkatrøð, 350 Vestmanna.
**Grannskoðari:**
Farin frá sum grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 3. februar 2004*
*Kristin Balle*

# Kunngerð

## frá útskiftingarnevndini í Kunoy

Útskiftingin innangarðs av Kunoyar bygd varð endað við úrskurði sagdur á fundi í Kunoy 28. januar 2004. Hesin úrskurður varð latin til ákæru frá sama degi sbrt. kap. 9 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivarin, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn. Kærufreistin er 3 mánaðir frá 28. januar 2004.

Á sama fundi varð metingin av kommunalu ognartøkuni latin til ákæru sbrt. § 4 í ognartøkulógini frá 07.05.1881. Kærufreistin er 3 mánaðir frá 28. januar 2004 at rokna.

Útskiftingarskjølini og metingin liggja frammi hjá kommununi í Kunoy og á Matrikulstovuni í Tórshavn, til kærufreistin er úti.

Víst verður eisini til heimasíðuna hjá Matrikulstovuni: www.matrikul.fo

N. v.
**Øssur Á. Midjord**
**útsk. form.**

**Tøkk**



*Hjartaliga tøkk til tykkum sum valdu javnaðarflokkin.*

*Ein serstøk tøkk til tykkum sum valdu meg persónliga.*

**Tummas Frank Joensen**


Sosialurin
Sosialurin
i


Götu Kommuna

**Gøtu kommuna søkir eftir einum**

# Dagrøktara

at byrja skjótast til ber.

Dagrøktarheimið skal vera innrættað barnavinarliga, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi, trygt spæliøki uttanfyri.

Í skipanini eru tríggir dagrøktarar, tveir í Syðrugøtu og ein í Norðragøtu. Vit hava skipað eina spælistovu, har dagrøktarar saman við børnunum og leiðaranum koma saman til ymiskt ein dag um vikuna, fríggjadag frá kl. 7.30 til kl. 17.15.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lokal 10.

Skrivlig umsókn skal sendast okkum áðrenn hósdagin 12. februar 2004.
Bygdarráðið tekur sær rætt til frítt at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

**Dagstovnurin í Gøtu**
Boks 32
511 Gøtugjógv

Havnar
SJÚKRAKASSI

# Umboðsval

Sambært § 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til val hósdagin 25. mars 2004.

4 umboð í Tórshavnar valdømi eru uppá val.

Uppskot til umboð skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi ikki seinni enn 11. mars 2004.

**Havnar Sjúkrakassi**

30. januar 2004

# Frá Tofta Arbeiðarafelag

**Aðalfundur felagsins verður leygardagin 21. februar 2004 kl. 15.00.**

Skrá sambært lógum felagsins.

Uppskot til aðalfundin skulu vera felagnum í hendi í seinasta lagi fríggjadgain 13. februar 2004.

**Nevndin**